# øgum

tað beinanvegin greitt, at alt er ikki modernað, at skynsemið ikki er fullgildugt og at meining røkkur upp um og aftur um einstaklingin. Sum einstaklingar eru vit feldir inn í fleiri grundsøgur, sum eru lívssøgan, familjan, ættin, siðaarvurin og modernaði broytiligi heimurin. Hesar grundsøgur umfata ein, um man vil tað ella ikki. Uppgerð og avdúking eru áhaldandi neyðugar, men aftaná er ein bundinskapur, sum bíðar eftir at vera kallaður framaftur. Modernitetur og upplýsing eru framvegis tey korini vit verða fødd inn í, men undir hesum býr eitt stórt minnisrúm, sum ikki kann troðkast burtur, uttan so at lívsneyðugar sannroyndir verða gloymdar.

## Tað talgilda er númodernað

Vit eru feld inn í fyribrigdi og prosessir, sum eru modernað og inn í fyribrigdi og prosessir sum onki hava við modernitet at gera. Í løtuni koma tingini til skarpskeringar meira enn tey hava gjørt leingi. Tað vísir seg sum eitt høvuðsrák við digitalisering av menniskjalívinum og sum eina tilvitan um ein undirstreym av grundsøgum. Globaliseringin og digitaliseringin kollvelta at kalla alt í hesum døgum. Sum kunnugt liva vit í einum nýggjum samfelag, sum av álvara fekk skap so seint sum í 1990'unum. Hetta samfelag hevur fingið óneyv heitið fest á seg so sum vitanarsamfelagið og informatiónssamfelagið. Meira beinrakið er at kalla nýggja samfelagið netverkssamfelagið.

Hetta samfelag snýr seg um meira enn talgilda kunningartøkni, sum skapar alla yvirflóðina av informatiónum. Digitaliseringin er kollveltandi í sjálvari sær við sínum møguleikum at goyma, viðgera, flyta og presentera informatiónir. Hetta ávirkar heimsbúskapin, heimspolitikkin og heimssamfelagið. Men tað veruliga kollveltandi potentialið, sum verður loyst við nýggju tøknini er tann stóra samtalan, vit rópa netverkið ella netmynstrið. Menniskjuni, sum skapa og brúka hesa tøkni eru koplað saman í einum netmynstri. Talgilda mentanin er netverksmentan við alnót og mobilnetmynstri frammi í oddinum. Vit ríða á talgildu bylgjuni saman við digitalum wonderboys og funky toppleiðarum. Men netverkssamfelagið er meira enn ótamd kapitalisma. Hátøknin miðsavnar makt og er samtíðis kreativ og miðspjaðandi. Hon er longu kastað út til einstaklingar í flestu av heimsins avkrókum, og Føroyar eru týðiligari á netinum enn á einum vanligum heimskorti.

Henda tøkni er ikki einans ein maktakkumulatur, men eisini ein møguleiki, sum er sáddur globalt. Netverkið ger tey ríku ríkari, men kveikir eisini ein tøkniligan pioneranda og skapar mótmentanir og kritiska tilvitan av ymiskum slag.

Hátøknin broytir okkara arbeiði, samveru, spæl og innlæring. Og sum alla aðrastaðni er alt møguligt fupparí og prime time shit við í spælinum. Teknologiídnadurin ger okkum ótrygg við at lumpa okkum til at halda, at vit blíva lukkuligari menniskju, um vit alla tíðina keypa tað nýggjasta og hottasta. Har mótaídnaðurin spælir uppá okkara fáfongd, spælir teknologiídnaðurin uppá okkara ótta fyri ikki at vera nóg munadygg og á okkara ótta fyri ikki at vera nóg væl koplað til øll netverkini.

## Yvirriðjandi essentialismukritikkur

Her sum í so mongum øðrum lutum ræður um at finna koplingspunktið. Koplingspunktið millum øru ferðina í digitalu darwinismuni og so alt tað, sum ikki er runnið úr tøkni og upplýsing. Vit liva í tveimum heimum. Á annan bógvin er alt tað, vit meina, sannkenna og skilja og á hin alt tað, sum vit eru bundin í og sum menniskjað ikki hevur skapt. Okkara lív er við øðrum orðum spent út millum heimsmeldur og hypertekst øðrumegin og ekkóið frá grundsøgunum hinumegin. Vit eru modernitetsrakt, men eisini fest í ein djúpari royndarheim, har trúnaður, trúskapur og minni búgva.

Alt er ikki konstruerað, søguligt og modernað. Moderniteturin hevur verið besettur av tí søguliga skilt sum ein hugsan um, at alt er konstruerað. Hetta hevur havt við sær ein yvirriðjandi essentialismukritikk. Tað, sum einaferð varð hildið vera gudgivið og essentielt sum øvrigheit, subjekt, kyn, náttúra, góðska og óndskapur er vorðið problematiserað og dekonstruerað. Hetta sýrubaðið var og er neyðugt, tí her lógu og liggja enn duldir kúgandi valdsbygnaðir, sum áhaldandi skulu demaskerast. Men eitt sýrubað er ongantíð nøktandi. Tí hevur filosofurin Paul Ricoeur greint í sínum máli, tá hann sigur um modernistisku avdúkingarfilosofiina, at aftaná eina oyðimarkargongd av kritikki brenna vit eftir at verða kallað aftur.

Hetta kallið snýr seg um at veita tingunum rættvísi og síggja størri søgur og samanhangir enn avdúking og uppgerð gera einsamallar. Tað er sum um at tað modernaða menniskja er vorðið minni bangið fyri at blíva vaksið og er við at fáa størri fráleika til sínar uppgerðir og avdúkingar.

## At minnast í einari flótandi verð

Vit mugu minnast, og soleiðis kunnu vit fortelja okkum inn í ta stóru fremmandageringina sum



*Í einari vágaligari flótandi verð skal tjóðin alsamt grundgevast og váttast av nýggjum. Tað velja vit at gera m.a. við at halda Ólavssøku, har koplingspunktið millum modernitet og siðvenju ongantíð er heilt tað sama, tí samfelagið og mentanin flyta seg alla tíðina. Føroyar eru í dag í stóran mun samstillaðar við umheimin. Tær eru eitt ikkimetropolt samfelag og skulu metast um á tann hátt, segði Bergur Moberg á fólkafundinum á Føroya Fólkaháskúla á Ólavsøku*

allur framburður og alt nýtt innlit er. Eg minnist t.d., at eg hoyrdi útoyggjakonu fortelja mær, tá hon kom til Klaksvíkar og sá eina kiosk fyri fyrstu ferð í lívinum. Hon hevði hug at nærkast hesum løgna fyribrigdi. Har var ongin breiður diskur við góðum útsýni til vørurnar, men bara ein lítil lúka. Hon visti ikki hvussu hon skuldi gera, og hvat hon vildi hava og helt seg tí aftur. Hetta er grundsøgan um tað nýggja, um tað modernaða. Man kennir hetta aftur í fremmandageringini mótvegis allari tí nýggju tøknini. Vit venja okkum sum frá líður við modernaðu hentleikarnar og nýggjar hugsanir, men teir nýggju sjónarringarnir eiga alsamt at nerva okkum og fáa okkum til at umráða okkum.

Órógv og spennandi røringur er í allastaðni. Ikki síðan jarnbreytarboomið í Onglandi í 1840'unum og gullfepurin í Kalifornia 10 ár seinni hevur tílíkur røringur verið í samskiftinum manna millum. Landamørk kámast burtur av innflytarum, ferðafólki og nýggjum netmynstrum. Hetta hevur fingið tjóðirnar at dubba seg í einari nýggjari bylgju av tjóðarbygging. Tjóðarbygging ella nationbuilding er góð, um tað snýr seg um at kenna seg sjálvan og sína bakgrund betri. Hon er eisini góð, um hon gevur meira sjálvsálit, sum jú kann opna meira enn vantandi sjálvsálit. Tað hava ikki minst smáar tjóðir brúk fyri. Men nationbuilding má ikki yvirriðja í teambuilding og ótta fyri kritikki innaneftir sum uttaneftir.

Í einari vágaligari flótandi verð skal tjóðin alsamt grundgevast og váttast av nýggjum. Tað velja vit at gera m.a. við at halda Ólavssøku, har koplingspunktið millum modernitet og siðvenju ongantíð er heilt tað sama, tí samfelagið og mentanin flyta seg alla tíðina. Føroyar eru í dag í stóran mun samstillaðar við umheimin. Tær eru eitt ikkimetropolt samfelag og skulu metast um á tann hátt.

## Eitt væl saltað stað

Her eru serligir møguleikar og serligar avmarkingar. Saltið rennur fram fyri meg. Føroyar eru eitt væl saltað stað, og tað eru allar grundsøgur eisini. Saltið verður í ymsum høpi brúkt sum mynd fyri varandi týdningi. Í hesum sambandi hevur onkur tosað um episka saltið ella saltið í modernaðum søguskaldskapi. Hyggur ein nærri, so ber væl til at samanbera mineralska saltið við episka saltið. Bæði saltsløgini fáa tað, sum tey binda seg í at halda sær longri. Matvørur verða saltaðar við ítøkiligum, mineralskum salti, og søguskaldskapur og aðrar søgur við skapa varandi týdning úr tí stokkuta. Hesi 'saltsløgini' hava eisini ein annan felags eginleika. Sjógvur kann uppleysa tunt galvaniseradar stengur eftir bara nøkrum fáum árum. Og skaldskapur hevur verið við til at miðla modernaða tankan, sum við satiru og kritikki hevur upployst gamlar skipanir.

Saltrákin uttan av havinum og innan úr søgunum minnir ein á, at tað dupulta, tað fleirtýdda er neyðugt. Alternativið til torgreinda, nervaða hugsan er einoygd ideologi av verðsligum og átrúnaðarligum slag. Allar modernaðar tjóðir útseta seg sjálvar fyri einari tílíkari dupultsalting: saltið í satiruni og saltið í tí felagskenslu og trúnaði, sum eitt stað og eitt mál gevur. Bæði hesi elementini eru sum kunnugt í Ólavsøkuni, og hesir báðir dagarnir eru partur av tí grundsøgu, vit kunnu kalla søguna um staðið. Sum traditiónsbundin hátíð snýr Ólavsøkan seg sum vera man fyrst og fremst um tað, sum sjóðar saman. Endamálið er eitt kollektivt time out í gerandisdegnum, har vit vátta kærleikan til staðið – tess náttúru, siðvenju og nútíðarmentan.

## Nationalismutýpur

Sum fólkafundirnir er tjóðarhátíðin partur av tjóðskaparhugsanini. Heldur ikki henda hugsan er sloppin undan sýrubaðnum hjá tí hvassa vísindaliga vitinum. Sambært globaliseringshugsanini vil tjóðstaturin blíva upployst mentanarliga og búskaparliga, tí alt hann umboðar er konstruerað ella gjørt. Men henda hugsan hevur ikki rætt í øllum. Tjóðstatirnir leggja dentin ymsastaðni, men hava allir eitt sterkt tilknýtið til staðið. Tann føroyski tjóðstaturin er fyrst og fremst eitt stríð fyri størri ella fullum avgerðarrætti, tann danski ber boð um sosialan konsensus, tann amerikanski er melodramatiskur osfr. Í samskifti og búskapi er tjóðstaturin gjøgnumgataður av altjóðageringini, men heimstaðarkenslan loðar sum nakað ólýsandi uppi við øllum hesum nationalismutýpum.

## Tá tríggjar grundsøgur tosa saman

Tað kann viðhvørt kennast fríandi ongan samleika at hava. Bara at vera fremmandur, navnleysur millum onnur navnleys og singla runt í The Land of Plenty. Men samleikin og Ólavsøkan hava eisini sína tíð. Vit mugu minnast, og vit mugu fortelja stórar sum smáar søgur. Ólavsøkan minnir okkum á, at áðrenn vit sjálvi siga nakra søgu, hevur mentanin, sum vit eru fødd inn í longu 'verið har' og fortalt ein part av okkara søgu. Men sum einstaklingar kunnu vit ikki krøkja okkum í grundsøgurnar í royndini at bjarga okkum undan kaopleksitetinum og so lata onnur fortelja alt fyri okkum tað veri seg sum einstaklingar ella fólk.

Nú síggi eg tann hvíta fordin fyri mær aftur. Hann nærkast Havnini, og tað er Ólavsøka í býnum. Tríggjar grundsøgur sita í honum og minna meg á, at samleikin má strekkjast út. Tær sita og práta saman á baksetrinum: lívssøgan hjá tí einstaka, moderniteturin og felagskenslan fyri heimstaðnum. Men bilførarin er fremmandur, ein ókend kraft. Hetta er mín bilur. Rustaður av øllum saltinum, men eisini eitt rúm við einum fyldigum og fleirfaldaðum ekkóið.

Takk fyri og framvegis góða Ólavsøku